# Sp/F Mykines

1. mai 2005 tóku Ellef Ellefsen og Tummas Henriksen yvir siglingina til Mykines, og síðani tá hava teir havt siglingina um hendi. Hetta gjørdist eisini byrjanin hjá Sp/F Mykines.

Á hvørjum ári byrja teir arbeiði tann 1. mai, tí hetta er dagurin, tá siglingin til Mykines byrjar. Fyrstu tíðina sigla teir mest við fólki út til Mykines, men tá juni mánaðurin byrjar at líða, kemur rættilig gongd á ferðafólkasiglingina. Tá skipar Sp/F Mykines fyri fleiri leigutúrum til m.a. Mykines, Tindhólm, Slættanes og eisini onkran túrin suður í Koltur.

Ellef Ellefsen sigur, at teir flestu leigutúrarnir vera gjørdir til Mykines ella Tindhólm.

- Ja, vit gera nógvar túrar til Mykines og til Tindhólm. Tindhólmur er helst serligur fyri okkum, tí tey allarflestu hava bæði sæð og tikið myndir av hólminum, men bert tey fæstu hava verið úti á hólminum, og tí er hann rættiliga serligur.

Ellef leggur afturat, at teir báðir byrjaðu so at siga frá ongum og hava síðani arbeitt seg upp til har, teir eru nú. Teir hava alla tíðina havt trúnna á ferðavinnuna, og sum heild eru teir væl nøgdir við gongdina hjá felagnum.

Siglingin til Mykines er bert á skránni um summarið, men hetta merkir tó ikki, at Sp/F Mykines liggur stilt um veturin. Teir eru nevniliga umboð fyri Polaris í Føroyum. So um veturin selja teir bóndasúkklurnar, sum eru blivnar kendar kring landið.


*Sp/F Mykines hevur summarsiglingina út til Mykines. Teir skipa tó eisini fyri leigutúrum til m.a. Mykines, Tindhólm, Slættanes og onkran túrin til Kolturs*


www.husamekling.fo
Húsamekling

Leitar tú eftir húsum
ella vilt tú selja hús tíni,
so er Húsamekling rætta staðið.
Hygg inn á www.husamekling.fo

VAGLIÐ · FO-100 TÓRSHAVN
TEL 31 93 21 · FAX 31 93 31

TÚRAR KRING VÁGAR, MYKINES & TINDHOLM

WWW.MYKINES.FO


www.LAKESIDE.fo
333 123

Vælkomin á **HOTEL NORÐ**

- 15 dupultkømur
- Matstova til 250 gestir
- Fundarhøli
- Barr
- Náttúruvakurt
- Buss til hurðina


FO-750 Viðareiði · Tel 45 12 44 · Fax 45 12 45
hotel@hotelnord.fo · www.hotelnord.fo


Alt innan VVS
VICTOR Á LAKJUNI

Stórt úrval av baðirúmsmøblum
Stangavegur 15 · 700 Klaksvík · Tel 45 60 68

WWW.VESTMANNABJORGINI.COM
TEL 471600

SJÓFERÐIR


Bo Grønt urtagarðurin
byrja summarið hjá okkum
2x3
TIMBUR HT HANDILIN
TÓRSHAVN · KAMBSDALUR